# Marine Harvest Føroyar hevur 60 mió í avlopi

**ALIVINNA** – Vit hava havt eitt gott ár í ár, og avlopið av hvørjum kilo av framleiddum laksi liggur um 10 krónur. Tað gevur okkum eitt úrslit upp á umleið 60 miljónir krónur – fyri skatt, sigur stjórin í Marine Harvest Føroyar, Ragnar Joensen

Vilmund Jacobsen

Alifelagið Marine Harvest í Føroyum, sum er partur av eini stórum samtaki, hevur havt eitt sera gott ár í ár.

Framleiðslan hjá føroyska partinum er umleið 6.000 tons av laksi, og avlopið fyri hvørt kilo liggur í ár um 10 krónur. Hetta fer at geva føroyska partinum eitt avlop fyri skatt upp á umleið 60 miljónir krónur, sum er eitt sera gott úrslit.

Ragnar Joensen er stjóri í Marine Harvest í Føroyum, sum hevur aling í Sundalagnum og á Oyndarfirði og smoltstøð á Hellunum.

Hann sigur, at ein orsøk til, at úrslitið í ár ikki verður enn betri er, at felagið hevði ongan stóran laks at selja yvir á amerikanska marknaðin í fyrra helmingi av hesum árinum.

– Amerikanski marknaðurin hevur verið góður til stóran laks, men vit hava eisini fingið góðan prís fyri tann minna laksin á eitt nú evropeiska marknaðinum.

> **...við sushi og øðrum nýggjum laksavørum veksur marknaðurin...**
> RAGNAR JOENSEN

Hann sigur, at tá ein marknaður gerst so góður, sum hin amerikanski hevur verið, dregur tað vanliga eisini prísirnar upp á øðrum marknaðum.

## Sløk 30 fólk

Marine Harvest í Føroyum hevur út við 30 fólk í føstum starvi, men tá talið av fólki á lønarlistanum er størst, nærkast tey 40-50 fólkum.

Ragnar Joensen vísir á, at tey 6.000 tonsini, sum føroyski parturin av felagnum kemur at framleiða og selja í ár, er lítil í mun til framleiðsluna hjá øllum samtakinum.

– Tilsamans hevur samtakið framleitt 340.000 tons av laksi í ár, harav umleið 200.000 tons eru framleidd í Noregi. Á øðrum plássi fyri kreppuna í Chili, lá suðuramerikanska landið á einum øðrum plássi, men seinnu árini hava Kanada og Skotland verið tey londini, sum hava ligið á øðrum plássi.

Stjórin sigur, at alivinnan í Chili nú er á veg fram eftir aftur, og hann væntar, at Chili í øðrum hálvári í 2011 leggur seg á eitt annað pláss í framleiðslu hjá samtakinum Marine Harvest.

## Lækkandi prísur

Árið, sum er gott, er ikki ringt.

Og hetta árið hevur verið stak gott hjá føroyskum alifeløgum.

Sjálvur væntar Ragnar Joensen, sum eisini er næstformaður í Føroya Havbúnaðarfelag, at marknaðarprísirnir fara at lækka so hvørt, sum Chili veksur um sína framleiðslu.

– Tað er væntandi, at Chili fer at gera tað trengri hjá øðrum laksi á amerikanska marknaðinum, og eitt nú noyðast lond, sum í dag hava stóra sølu í USA, tá at senda størri nøgdir á evropeiska marknaðin.

Hann sigur, at tað eru teir, sum vænta, at marknaðurin fer at veksa nokso fitt, soleiðis at afturgongdin í prísi kanska ikki verður so stór kortini.

– Við sushi og øðrum nýggjum laksavørum veksur marknaðurin. Eingin ivi er um tað, men eg vænti, at vit koma at síggja heilt aðrar prísir so hvørt, sum árið 2011 fer at líða, sigur Ragnar Joensen, stjóri í Marine Harvest Føroyar.

vilmund@sosialurin.fo



*- Tá ein marknaður gerst so góður, sum hin amerikanski marknaðurin hevur verið, dregur tað eisini prísirnar upp á øðrum marknaðum, sigur Ragnar Joensen, stjórin í Marine Harvest Føroyar*



*Marine Harvest Føroyar selir bara feskan laks. Felagið hevur aling í Sundalagnum og á Oyndarfirði, og smoltstøð á Hellunum, men hevur onga portiónsframleiðslu*